SKJÓTISAMBAND FØROYA

# Ársroknskapur 2019

V-tal 474207
V-tal (serskilt) 632899

skot@skot.fo
http://skot.fo

31-03-2020

LEIÐSLUÁTEKNING

Nevndin hevur í dag viðgjørt og samtykt ársfrásøgnina fyri 2019 hjá Skjótisambandi Føroya.

Tað er okkara fatan, at nýtti roknskaparhátturin er hóskandi, soleiðis at ársfrásøgnin gevur eina rætta mynd av ognum og skyldum, fíggjarligu støðuni, rakstrarúrslitinum og peningastreyminum.

Ársfrásøgnin verður hervið løgd fyri ársaðalfundin til góðkenningar.

Tórshavn, tann 22. apríl 2020

Esmar Joensen
formaður

~~Marius F. Joensen~~
nevndarlimur
JÓANNIS JOENSEN

Jógvan Egholm
nevndarlimur

Finn Ludvig
nevndarlimur

Jónstein Jóhannesen
nevndarlimur

## Átekning frá óheftum grannskoðara

***Til nevndina í Skjótisambandi Føroya***

**Niðurstøða**
Tað er okkara fatan, at ársroknskapurin gevur eina rættvísandi mynd av felagsins ognum, skyldum og fíggjarligu støðuni tann 31. desember 2019 og av úrslitinum av virksemi felagsins í roknskapartíðarskeiðnum frá 1. januar til 31. desember 2019 samsvarandi nýttu roknskaparreglum.

**Hvat vit hava grannskoðað**
Ársrsroknskapin hjá Skjótisambandi Føroya fyri roknskaparárið 2019 við rakstrarroknskapi og fíggjarstøðu, saman við nýttum roknskaparhátti felagsins. Undir einum nevnt "Ársfrásøgnin".

**Grundarlag fyri niðurstøðuni**
Grannskoðanin er løgd til rættis í samsvari við altjóða standardum fyri grannskoðan og øðrum ásetingum í føroysku grannskoðanarlóggávuni. Okkara ábyrgd eftir hesum standardum og ásetingum er nærri greidd frá í niðanfyri standandi broti "Ábyrgd grannskoðarans fyri at grannskoða ársroknskapin". Vit eru óheft av felagnum í samsvari við altjóða etisku krøvunum fyri grannskoðarar (etisku reglunum hjá IESBA) og øðrum ásetingum, sum er galdandi í Føroyum, og hava hildið okkara etisku skyldur, sum ásettar eru í hesum standardum og krøvum. Tað er okkara fatan at vit hava fingið nøktandi grannskoðanarprógv, ið kunnu vera grundarlag undir okkara niðurstøðu.

**Ábyrgd leiðslunar av ársroknskapinum**
Leiðslan hevur ábyrgdina av at gera ein ársroknskap, ið gevur eina rættvísandi mynd í samsvari við nýttu roknskaparreglum. Leiðslan hevur harumframt ábyrgdina av tí innanhýsis eftirliti, ið leiðslan metir skal til fyri, at ársroknskapurin kann gerast uttan týðandi skeivleikar, uttan mun til um skeivleikarnir standast av sviki ella mistøkum.

Tá ársroknskapurin verður gjørdur, hevur leiðslan ábyrgdina av at meta, um felagið megnar at halda fram við rakstrinum; at upplýsa um viðurskifti viðvíkjandi framhaldandi rakstri, har tað er viðkomandi; umframt at gera ársroknskapin eftirroknskaparmeginregluni um framhaldandi rakstur, uttan so at leiðslan hevur í hyggju at avtala felagið, steðga rakstrinum, ella, at leiðslan í roynd og veru ikki hevur annan møguleika.

**Ábyrgd grannskoðarans fyri at grannskoða ársroknskapin**
Okkara endamál er at fáa grundaða vissu fyri, at ársroknskapurin í síni heild ikki hevur týðandi skeivleikar, uttan mun til um skeivleikarnir standast av sviki ella mistøkum og at gera eina grannskoðanarátekning við eini niðurstøðu. Grundað vissa er vissa á høgum stigi, men er ikki full trygd fyri, at ein grannskoðan, sum er gjørd eftir ásetingunum í altjóða standardum um grannskoðan, og ásetingunum í føroysku grannskoðanarlóggávuni, altíð kann avdúka týðandi skeivleikar, um hesir eru. Skeivleikar kunnu koma fyri orsakað av sviki ella mistøkum og mugu metast at vera týðandi, um tað eru sannlíkindi fyri, at tey hvør sær ella saman ávirka tær fíggjarligu støðutakanir, sum roknskaparbrúkararnir taka við støði í ársroknskapinum.

Sum ein liður í grannskoðanini, ið verður gjørd eftir altjóða standardum um grannskoðan og øðrum ásetingum, sum er galdandi í Føroyum, gera vit yrkisligar metingar og hava eitt yrkisligt ivingarsemi undir grannskoðanini. Har vit eisini:

- Eyðmerkja og meta um váðan fyri týðandi skeivleikum í ársroknskapinum, uttan mun til um skeivleikarnir standast av sviki ella mistøkum, leggja til rættis og gera tey grannskoðanararbeiðir, sum hesir váðar krevja, umframt fáa til vega tey grannskoðanarprógv, sum eru nøktandi at vera grundarlag undir okkara niðurstøðu.

- Fáa eina fatan av innanhýsis eftirlitinum, sum er viðkomandi fyri grannskoðanina, fyri at kunna leggja grannskoðanina til rættis eftir umstøðunum, men ikki fyri at kunna gera eina niðurstøðu um dygdina á innanhýsis eftirlitinum.

- Taka støðu til um roknskaparhátturin, sum leiðslan nýtir, er hóskandi, og um tær roknskaparligu metingarnar og tilhoyrandi upplýsingar, sum leiðslan hevur gjørt, eru rímiligar.

- Gera niðurstøðu um, hvørt tað er hóskandi, at leiðslan hevur gjørt ársroknskapin við støði í roknskaparmeginregluni um framhaldandi rakstur, umframt um tað við støði í teimum grannskoðanarprógvum, sum er fingin til vega, er týðandi óvissa um hendingar og viðurskifti, sum kunnu viðføra týðandi iva, um felagið megnar at halda fram við rakstrinum. Um okkara niðurstøða er, at tað er ein týðandi óvissa, skulu vit í okkara grannskoðanarátekning vísa á upplýsingar um hesi viðurskiftini í ársroknskapinum ella, um hesar upplýsingarávísingarnar ikki eru nøktandi, tillaga okkara niðurstøðu. Okkara niðurstøður byggja á tey grannskoðanarprógv, sum vit hava fingið fram til dagfestingina á okkara grannskoðanarátekning. Hendingar og viðurskifti í framtíðini kunnu tó føra við sær, at felagið ikki longur megnar at halda fram við rakstrinum.

- Meta um samlaðu framløguna framløguna, bygnaðin og innihaldið í ársroknskapinum, herundir upplýsingarnar í notunum, umframt um ársroknskapurin vísir tey grundleggjandi handilsviðurskifti og hendingar á ein slíkan hátt, at tað gevur eina rættvísandi mynd av hesum.

Vit samskifta við leiðsluna um millum annað vavið á ætlaðu grannskoðanini, og nær grannskoðað verður og eisini um týðandi eygleiðingar, herundir um møguligar týðandi manglar í innanhýsis eftirlitinum, sum vit eyðmerkja undir grannskoðanini.

**Ummæli av leiðslufrágreiðingini**
Leiðslan hevur ábyrgdina av leiðslufrágreiðingini.

Okkara niðurstøða um ársroknskapin fevnir ikki um leiðslufrágreiðingina, og vit geva onga váttan við vissu um leiðslufrágreiðingina.

Í sambandi við okkara grannskoðan av ársroknskapinum er tað okkara ábyrgd at lesa leiðslufrágreiðingina og í hesum sambandi at umhugsa um leiðslufrágreiðingini er í týðandi ósamsvari við ársroknskapin ella ta vitan, ið vit hava fingið undir grannskoðanaini, ella á annan hátt tykist at hava týðandi skeivleikar.

Okkara ábyrgd er eisini at umhugsa um kravdu upplýsiingarnar eftir nýttu roknskaparreglum eru umrøddar í leiðslufrágreiðingini.

Við støði í gjørda arbeiðnum er tað okkara fatan, at leiðslufrágreiðingin er í samsvari við ársroknskapin, og at hon er gjørd í samsvari við ásetingarnar í nýttu roknskaparreglum. Vit eru ikki vorðin varug við týðandi skeivleikar í leiðslufrágreiðingini.

Tórshavn, tann 22. apríl 2020

**MENA Sp/f**
skrásett grannskoðanarvirki

Óli Regin Hansen
skrás. grannskoðari

## NÝTTUR ROKNSKAPARHÁTTUR

Ársfrásøgnin hjá Skjótisambandi Føroya er uppsettur eftir roknskaparháttinum, ið er lýstur niðanfyri.

**Alment**
Allar inntøkur verða førdar í rakstrarroknskapinum, so hvørt tær verða vunnar. Hetta er eisini galdandi fyri virðisbroytingar á fíggjarligum ognum og skyldum. Allur kostnaður, sum hoyrir árinum til, verður tikin við í rakstrarroknskapinum, eisini møguligar avskrivingar og niðurskrivingar.

## RAKSTRARROKNSKAPURIN

**Inntøkur**
Stuðul verður tikin við og tíðargreinaðar, samsvarandi sáttmálainnihaldinum.

**Kostnaður**
Rakstrarkostnaður fevnir um allan kostnað, sum knýtir seg til høvuðsraksturin hjá sambandinum.

## FÍGGJARSTØÐAN

**Áogn**
Áognin er tikin við til áljóðandi virði. Tapsvandi verður gjørdur upp eftir einstaklingameting og frádrigin í rakstrinum.

**Skuld**
Skuld verður tikin við til áljóðandi virði við árslok.

**Rakstrarrokniskapur fyri tíðina 1. januar til 31. desember 2019**

| K.nr. | | 2019 kr. | 2018 kr. |
|---|---|---|---|
| | **Inntøkur** | | |
| 1030 | Stuðul frá Ítróttavedding (býti) | 481.541 | 488.790 |
| 1035 | Limagjald limafeløg í SkF | 12.000 | 0 |
| | | **493.541** | **488.790** |
| | **Inntøkur lands- / FM-kappingin** | | |
| 1040 | Luttøkugjøld | 64.250 | 60.750 |
| 1045 | Luttøkugjøld venjingarlega | 9.000 | |
| | | **73.250** | **60.750** |
| | **Lønir** | | |
| 2030 | Lønir til fyrisiting, samskipan og miðlar | 15.118 | 19.337 |
| | | **15.118** | **19.337** |
| | **Útreiðslur til venjarar / venjaraskeið / venjingarlega** | | |
| 2914 | Venjingarlega 2018 | | 6.048 |
| 2915 | Venjingarlega 2019 | 76.806 | 120.000 |
| 2940 | Kappingar / venjingar uttanlanda | 40.000 | 34.000 |
| | | **116.806** | **160.048** |
| | **Útreiðslur landslið** | | |
| | *Oyggjaleikir (OyL)* | | |
| 3041 | Ískoyti til kapping uttalands | 27.000 | |
| 3050 | Luttøka (ferðing, uppihald og kostur v.m.) | 70.475 | 0 |
| 3043 | Útreiðslur til úttøkuna | 35.039 | 210 |
| 3045 | Venjingarstuðul undan OyL (úrvalsskjúttar) | 65.480 | 0 |
| 3070 | Búnar, prent, reklamur, v.m. | 4.272 | 229 |
| 3090 | Annað | 0 | 0 |
| | | **202.267** | **439** |
| | **Útreiðslur landslið** | | |
| | *Nordic Shooting Region (NSR)* | | |
| 3141 | Luttøka (ferðing, uppihald og kostur v.m.) | 77.889 | |
| | | **77.889** | |
| | **Útreiðslur, Ungdóms manslandsliðið** | | |
| 3303 | Ískoyti til venjing | 9.450 | |
| | | **9.450** | **0** |

| | | | |
|---|---|---|---|
| | **Lands-/FM kappignar** | | |
| 3520 | Vallarleiga v.m. | 45.000 | 45.000 |
| 3525 | Lóður og dúgvur | 64.156 | 49.950 |
| 3535 | Føroya Cup vinningar | 17.500 | 18.000 |
| 3536 | Grand Prix vinningar | 17.500 | |
| 3545 | FM vinningar | 12.000 | 22.500 |
| 3550 | Prentlutir (billettir og skráir oa) | 2.797 | 5.406 |
| 3555 | FM vinningar unglingar | 5.000 | 6.000 |
| 3565 | FM heiðursmerki og ferðasteyp | 1.645 | 5.081 |
| 3570 | Búnar (skjótivestar og t-shirts) | 49.913 | 8.100 |
| 3575 | Keyp av nýggjari kastimaskinu sambært rokning | | 15.000 |
| 3580 | Annað (matur og drekka til FM) | 1.241 | 989 |
| 3585 | Viðlíkahald av kastimaskinum | 41.400 | 36.450 |
| 3595 | Heiðursmerki, steyp, kostur og umhvørvisendurgjald | 27.600 | 24.300 |
| | | **285.752** | **236.776** |
| | **Útreiðslur til skeið** | | |
| 3710 | Kostnaður fyri skeiðshaldara | 8.000 | 0 |
| 3711 | Rekrutering av nýggjum skjúttum | 9.000 | 20.000 |
| 3712 | Luttøkugjald | | 200 |
| 3730 | Tilfar til skeið | 573 | 4.500 |
| | | **17.573** | **24.700** |
| | **Felagskostnaður** | | |
| 4015 | Útreiðslur til altjóða fundir | 12.523 | |
| 4130 | Fundarútreiðslur | 2.492 | 2.595 |
| 4140 | Umboðan | 2.950 | 1.474 |
| 4170 | Starvsnevndarfundir | 2.270 | 558 |
| 4210 | Tryggingar | 9.769 | |
| 4230 | Heimasíða - lýsingar | 1.341 | 9.030 |
| 4430 | Tól, teldur o.a. | 375 | 1.300 |
| | | **31.719** | **14.957** |
| | **Fyrisitingarútreiðslur** | | |
| 4470 | Grannskoðan | 6.250 | |
| 4490 | Bankakostnaður | 2.123 | 1.814 |
| | | **8.373** | **1.814** |
| | **Úrslit** | **-198.155** | **91.469** |

## Fíggjarstøða pr. 31. desember 2019

| | 2019<br>kr. | 2018<br>kr. |
|---|---:|---:|
| **Ogn** | | |
| Skuldarar | 0 | 2.229 |
| Betri Banki | 498.737 | 679.939 |
| **Ogn tilsamans** | **498.737** | **682.168** |
| | | |
| **Skuld** | | |
| Eginogn: | | |
| Saldo primo | 351.317 | 259.848 |
| Ársúrslit | -198.155 | 91.469 |
| **Eginpeningur ultimo 2019** | **153.162** | **351.317** |
| | | |
| **Ognarar** | | |
| Ikki útgoldnir vinningar FM | 16.250 | 32.000 |
| Ikki útgoldnir vinningar Føroya Cup | 9.500 | 26.000 |
| Ikki útgoldnir vinningar Grand Prix | 11.000 | |
| Venjingarlega | 120.000 | 120.000 |
| Venjara til Føroyar | 24.000 | 24.000 |
| Nordic Shooting Region | 120.000 | 42.851 |
| Vallarleiga og kastimaskina | | 60.000 |
| Rekrutering | 20.000 | 20.000 |
| Lønir til fyrisiting | 0 | 6.000 |
| Aðrir ognarar | 24.825 | 0 |
| **Skuld tilsamans** | **345.575** | **330.851** |
| | | |
| **Skuld og eginpeningur tilsamans** | **498.737** | **682.168** |